## DAGSINS MEINING

# Valið er ikki millum loysing og samband

Seinasta veljarakanningin vísir, at Tjóðveldisflokkurin og Sambandsflokkurin fáa føroysku fólkatingsumboðini næstu 4 árini. Kanningin vísir samstundis, at Javnaðarflokkurin hevði verið størstur, um løgtingsval var í dag. Hetta seinasta er ikki gjørt so nógv burturúr, hóast - ella kanska akkurát tí at - hetta er fyrstu ferð síðani seinasta løgtingsval, at Javnaðarflokkurin stendur til at gerast størstur.

Tað, at Tjóðveldisflokkurin fyri fyrstu ferð síðani seinasta val ikki stendur til at gerast størstur, má merkja, at veljarin hevur innsæð, at í innanlandspolitikki merkir ein atkvøða fyri Tjóðveldisflokkinum eina atkvøðu fyri Fólkaflokspolitikki.

Hví sær so øðrvísi út við fólkatingsvalinum?

Sambandsflokkurin og Tjóðveldisflokkurin eiga lívið í hvørjum øðrum. Hesir flokkar hava allan áhuga í at lýsa heimin sum verandi svart/hvítan. Teir neutralisera hvønn annan og koma at tryggja, at vit ongan veg koma viðvíkjandi ríkisrættarligu støðuni. Annar flokkurin vil ikki broyta og hin vil hava alt ella einki - og fær sostatt einki.

Millumloysnin er vegurin fram, men tá loysingarmenn ikki vilja hava nakað annað, enn teirra egna uppskot, so stendur alt í stað.

Seinastu fýra árini er millum lítið og einki hent á sjálvstýrisleið, og er tað stívrenda støða Tjóðveldisfloksins, ið hevur gjørt hetta. Klandur og konfrontatión førir ongan veg. Tað førir heldur ongan veg at ganga og rópa upp um avtalubrot og brot á altjóða mannagongdum o.s.fr.

Viðurskiftini millum Føroyar og Danmark fara at versna betýðiligt, um Tjóðveldisflokkurin fer at brúka fólkatingssessin, sum ein pall at dyrka sínar undirlutakenslur.

Tað verður skomm fyri Føroyar og fer at sáa iva um føroyskt sjálvræði, um tjóðveldismenn fara at aka á knøum fyri at krevja virðing og fáa danska Fólkatingið at viðurkenna føroyingar sum tjóð. Tað evni er slett ikki til diskussión. Vit føroyingar skulu ikki undirbrotliga spyrja danska fólkatingið eftir.

Vónandi vísir tað seg at gerast meira samsvar millum atkvøðubýti til løgtingsval og fólkatingsval. Polariseringin milum loysing og samband forðar fyri realpolitikki og fer bert at gera, at vit fara at standa í stað viðvíkjandi støðu Føroya í ríkinum.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

Áheitan

# Amboð nýtt við hegni

**Atli P. Dam**



Tit veljarar, sum sambært seinastu veljarakanning ætla at velja Javnaðarflokkin til størsta flokk á løgtingi við 9-10 umboðum, fremjið nú ikki skeivan leik komandi týsdag.

Sambært sjálvsavgerðarrætti okkara, er tað á Føroya Løgtingi, støðið undir øllum politikki innlendis sum úteftir verður lagt. Har verða loysnir samtyktar og sáttmálar góðkendir, tað verði seg eisini um broytingar í stjórnarviðurskiftum okkara.

Tað er tí gløgt fatað av tykkum, at tann flokkur, sum kann leggja hetta arbeiði tilrættis, kann skapa semjurnar og kann bera tær á mál í samráðingum úteftir, einaferð enn má verða Javnaðarflokkurin, tí velja tit hann sterkast á løgting.

Í hesum arbeiði hevur flokkurin brúk fyri øllum tøkum amboðum, eisini fólkatingsumboðanini, tað er tí óheppið, at nøkur tykkara umhugsa at "læna" Sambandsflokkinum og Tjóðveldisflokkinum so mikið av atkvøðunum, at vandi er fyri, at flokkurin, tit ætla at kjósa til løgtingsumboð tykkara við 27,5 % av atkvøðunum gerst ov stuttur til at vinna fólkatingsumboðan.

Allir flokkar sanna nú, at nýggjur sáttmáli skal gerast Føroya og Danmarkar ímillum, flestu sanna eisini, at tað er ov tepurt, at bert helmingurin av føroyingum stendur aftanfyri hendan sáttmála. Samstundis vita øll, at ongantíð eru broytingar framdar uttan tá Javnaðarflokkurin hevur tikið undir og fyriskipað tær.

Hann er tí framvegis tann flokkurin, sum eigur lykilin til eina virðiliga loysn, sum røkkur upp um 50 % markið, ja helst upp móti 80 %'um og sum verður til sóma fyri bæði føroyingar og danir.

Størsta fyrimunin av fólkatingsumboðanini fáa føroyingar sjálvandi, tá hendan við hegni stuðlar tí flokki, sum tit ætla skal stjórna heima í Føroyum.

Vónandi bera tit hetta í huga 20. november 2001.

# En røst fra havet

**- eitt aftursvar til Jákup Joensen úr Sumba**

**Heðin Mortensen**
*løgtingsmaður*



Tað er mangan hugaligt at síggja, hvussu fólk víða um landið fylgja við í arbeiðinum hjá tingmonnum. Enn meiri hugaligt er, at menn á sjónum, eitt nú á kraftblokkaveiðu í donskum sjógvi, hava kunnleika ikki bert til tingarbeiðið, men sanniliga eisini til innanhýsis nevndarskjøl.

Jákup Joensen hevur áhuga fyri tí stríði, sum stóðst í uttanlandsnevndini, tá løgmaður bað um viðmæli til at loyva okkara sameindu at flúgva um føroyskt loftrúm. Heldur enn at ilskast um, at løgmaður ikki bíðaði við at svara dønum, so er hesin kappin úr kvæðabygdini illur um, at næstformaðurin í uttanlandsnevndini ikki leip á leistum fyri formanninum.

Jákup vil nú ikki bert rekja nótafløkjur, men eisini nevndarfløkjur. Hann spyr, um Heðin Mortensen ikki visti, hvat málið snúði seg um,

tá hann loyvir sær at siga, at formaðurin ætlaði at misnýta tað.

Til tess er at svara, at Heðin Mortensen visti, at Hergeir Nielsen ætlaði at misnýta málið til eina markering av síni avgjørdu støðu í ríkinum, hann vildi hava aðalorðaskifti um ríkisstøðuna og alt sum haruppií hongur. Hinvegin visti Heðin Mortensen ikki nógmikið um málið sjálvt, til at Heðin Mortensen var nøgdur. Og um so Heðin fær alt bókasavnið í Sumbiar skúla sendandi, so veit Heðin ikki nóg mikið um flogmálið, fyrr enn Heðin sjálvur er tilfreds við teir relevantu upplýsingarnar.

So einfalt er tað. Takk fyri áhugan og framhaldandi góða kraftblokkaveiðu. Og sig nú endiliga frá, um tú veitst nakað um uttanlandsnevndina, sum eg ikki veit.


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:**
Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:**
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Tíðindaleiðari:**
Jústinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo
**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Anja Weihe anja@sosialurin.fo
**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo
Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1
700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.




## FÓLKATINGSVALIÐ 2001

# Í hjørtum okkara býr frælsið…

**Johan Dahl**
*Valevni Sambandsfloksins*



Hetta er heiti á valgrein hjá tjóðveldishøvdinganum Heina í Kunoy, sum nú ætlar sær á Danating. Hesi orð eru eins sonn og tey eru søgd. Munurin á honum og mær er bert, at eg lati ikki hjartað einans stýra frælsistilgongdini - neyðugt er eisini at brúka høvdið, ella rættari ,- at latað sunna fornuft fáa pláss eisini.

At lata hjarta einans ella kenslur einans stýra eini tjóð er beinleiðis lívshættisligt; tað hava vit mong ræðandi dømi um upp gjøgnum tíðina. Seinasta feska dømi er Afganistan, har religiøsir ørvitisfiskar hava jarðlagt eina tjóð, og í teirra maktarloysi lata sína ómegd ganga út yvir menniskju, sum onki hava við teirra hjartasøk at gera. Allir føroyingar, ið framvegis nýta kreativa partin av heilanum vita eisini um hópin av dømum um tær ræðuligu avleiðingar hjartastýrd nationalisma hevur havt við sær í farnu øldum.

Allir føroyingar - uttan undantak - hava eina frælsishugsjón. Men henda frælsishugsjón verður hjá summun til eina nærmast fyrilitaleysa religión, og tá er hon beinleiðis vandamikil.

Hvør og hvat hevur skapt hetta deiliga land, sum vit øll elska ?? Er tað polittiska orðaskvaldrið hjá teimum, sum halda seg hava patent uppá heitið "FØROYINGAR"? Nei, tað er ikki loysing, ið hevur skapt framburðin í Føroyum, men loysnir.

Loysnir koma ikki av at lata undirlutakenslur stýra okkum. Onki frambrot í heiminum er komið umvegis kenslur, men eru sprotnar úr sunnum heilavirksemi.

Vit skulu byggja landið við umhugsan og tí ekspertisu, sum vit hava í stóran stíl millum vanligar føroyingar, tí tað verður hvørki hvíta- ella svartabók, sum fara at geva okkum mat á borið.

Veruligt frælsið er tað frælsið, ið kemur sum ein náttúrlig avleiðing av góðum støðuføstum vøkstri og framburði í vinnuni - verði tað seg fiskivinna, alivinna ella oljuvinna.

Í dag er tað ein megin-regla, at fólk allastaðni knýta seg tættari saman, fyri at útjavna munin millum samfeløgini. Vit eru eitt fólk - FØROYINGAR - líkamikið hvat nationalsocialistarnir - og nú eisini teir konservativu - royna at bera fram. Vit fara ongantíð at verða betri fyri sum fólk við at isolera okkum frá umheiminum ella nærumhvørvinum.

Tí fer tað bara at verða skinsamur samskiftispolitikkur, sum er sprottin í vælumhugsaðum framburðsætlanum, sum fer at føra til, at allir føroyngar í framtíðini fara at siga av hjarta: "Nú er satt frælsið fyri øll vorðið ein veruleiki"!!

Tað er hetta sambandsflokkurin stendur fyri - eisini á fólkatingi - so valið er títt.

Tekur tú heilan við í støðutakanina, so verður tú verandi høgrumegin miðjuna og velur sambandsflokkin á valinum týsdagin 20. nov.

Gott val.

# Realistiskar loysnir og sjálvsvirðing

**Eyðgunn Samuelsen**
*valevni á Javnaðarlistanum.*



Tað er altavgerðandi fyri hvussu framtíðarstøða Føroya verður loyst, hvørjir flokkar koma at umboða okkum á fólkatingi komandi 4 árini.

Vit hava sæð, hesi síðstu 4 árini at fullveldisætlanin ikki loysir nakran trupulleika, heilt einfalt tí fólki ikki tekur undir við henni. Á hinum vonginum hava vit dagføringina av heimastýrislógini, ið er loysnin hjá Sambandsflokkinum. Hetta uppskot loysir heldur ongan trupuleika, tíðin er farin frá heimastýrislógini og tí hevur henda loysn heldur ikki nóg stóra undirtøku millum fólk. Vit mugu møtast á miðjuni og tað er tað ið fólkið ynskir. So tað ið stendur eftir er Sjálvstýrislógin hjá Javnaðarflokkinum ið savnar fólki heldur enn at spjaða. Allir meir ella minni fullveldisflokkar mugu ásanna at tað er høpisleyst at noyða "alt ella onki" loysnir ígjøgnum. Vit skulu eisini búleikast í Føroyum aftaná at hetta málið er avgreitt, tí má loysnin vera tann ið savnar flest fólk.

Eitt annað slagorð í hesum valstríðið er sjálvsvirðing, men hvat gevur sjálvsvirðing ?

At onki er gjørt í 4 ár fyri at útvega røktarheimspláss? At onki er gjørt fyri at útvega bústaðir til fólk við serligum tørvi - ikki so frætt, at tey eru við í eini langtíðarætlan ?

At ongin døgnrøkt er til tey eldru ið liggja óhjálpin heima ?

Ella er trupuleikin at onkur dani ikki kennur okkara merki? eg spyrji bara!

Fyri Javnaðarflokkin geva øll hesi óloystu mál als ikki sjálvsvirðing. Verðuliga sjálvsvirðing fáa vit tá ið vit gera nakað við at loysa hesar trupuleikar og fyrsta fortreytin er at velja flokkar ið vilja. Eitt samfelag har tú veit at tú kann fáa ein virðuligan aldurdóm, tað gevur sjálvsvirðing! Velji tí Javnaðarflokkin tann 20. november!

# Munur á monnum

**Katrin Dahl Jakobsen**
*valevni Javnaðarfloksins*



**Góð kor fyri tey ríku.**
Borgarliga samgongan hevur verið ófør, sum hon hevur fjálgað og hjúklað um tey ríku. Tey allar allar ríkastu fingu mest. So lagalig var hon, at hon fann upp ein spildurnýggjan vinnustuðul júst til hesi, og sum munar best hjá teimum, sum hava mest. Ikki er neyðugt at søkja um henda stuðul. Hann kemur púrasta av sær sjálvum og hevur fingið tað meinaleysa heitið "skattalætti" ella "karmur" ístaðin fyri stuðul. Tað ljóðar líkasum av minni. Men lítið er tað ikki. Samgongan hevur givið øllum partafeløgum ein skattalætta uppá 25%. Tí er hetta góður biti hjá teimum, sum hava mest at skatta av. Tað er ikki framleiðsluvinnan, sum fær allar mest burtur úr hesum stuðli, men heldur stóru og sterku handilsfyritøkurnar. Samgongan man hava hildið hesar hava ov trong kor at virka undir.

**Bleytu virðini við skerdan lut.**
Fólkið fekk 3- 5% **hægri** skatt.

Borgarliga fullveldissamgongan helt teirra karm vera í so rúmsáttan.Tí gjørdi hon av, at brúka minni uppá tey. Til almanna-, heilsu- og skúlamál fer hon í 2001 at brúkta 3% minni av samlaða framleiðsluvirðinum enn fyri 10 árum síðani. Hetta ber til við

- framhaldandi at hava deildir stongdar á Landssjúkrahúsinum, sum um talan var um yvirkapasitet
- einki ellis og røktarheimspláss at útvega
- einki at gera fyri tey við skerdum førleika
- lata næmingar við serligum tørvi og teirra foreldur sigla sín egna sjógv bara fyri at nevna nøkur.

Men ikki smæðast hesi somu at bjóða seg fram á Fólkating. Tey ætla sær at upplýsa um Føroyar. Neyvan fara tey at siga allan sannleikan. Vel tí Javnaðarflokkin.

# Avgerðarrætturin er okkara

**Gunnvá Mortensen**
*Valevni Javnaðarfloksins*

Ført verður fram, at Javnaðarflokkurin hevur ikki virðing fyri sær sjálvum, men bert prædikar svartskygni.

Javnaðarflokkurin ynskir samstarv og loysnir heldur enn konfrontaiónir, er tað svartskygni? Konfrontatión er ikki nakað væla avrik og eigur heldur ikki at liggja til grund fyri sjálvsvirðing. Heldur ikki, er ógrundað bjartskygni eitt tekin um dugnaskap.

**Javnaðarflokkurin hevur lagt góðar lunnar**
Hóast Javnaðarflokkurin hevur lagt góðar lunnar, bæði á Fólkatingi og heima í Føroyum, er nógv eftir at arbeiða fyri. Við fólkatingsumboðanini fer Javnaðarflokkur-in at arbeiða fyri, at vit koma burtur-úr ósemjum millum føroyskar og danskar myndugleikar, og har fara vit at samstarva um tey mál, ið eru felags millum Føroyar og Danmark. Flokkurin fer at veita kunning til danska fólkið og at boða stevnu floksins.

**Kvinnan harðast rakt**
Tann politikkur, ið henda samgonga hevur ført, hevur eftir mínum tykki verið illa raðfestur. Eldrarøktin, ið umframt at vera eitt samfelagsmál, eisini er eitt kvinnumál, skilt á tann hátt, at tað oftast er kvinnan, ið noyðist heim úr arbeiði at taka sær av slíkari røkt, er nú so langt afturúr sigld, at tað er óvirðiligt fyri allar partar. Fleiri eru tey, ið sita einsamøll og óhjálpin, uttan at nakað ítøkiligt verður gjørt fyri at betra um støðuna.

Vit mugu ásanna, at tey gomlu verða ikki sett frammarlaga í raðfestingini, og tað verður javnstøðan heldur ikki. Sam-stundis verður reypað um játtanir á fleiri økjum - so stórar sum ongantíð áður. Hvussu verður hesin peningur nýttur? Hevur eingin ábyrgdina av t.d. at lata niðurløgdu deildirnar á Landssjúkrahúsinum uppaftur? Er tað ikki uppgávan hjá Landsstýrismonnum at síggja til, at játtaði peningurin kemur teimum tilgóðar, ið hava hann fyri neyðini?

**Avgerðarrætturin er okkara**
Javnaðarflokkurin raðfestir fólkið fyrst - tá ber til at hava virðing fyri sær sjálvum.

Okkara sjálvsfatan viðurkennir, at sjálvsavgerðarætturin er okkara, hvør skuldi annars tikið avgerðirnar? Vit eru ikki bangin fyri at taka við ábyrgd, og hava tí ongantíð verið bangin fyri siðiligum samstarvi.